## VIÐMERKINGAR

# Ein viðkomandi spurningur – men ?



POUL MICHELSEN
Løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin

**– Eg tori við stórari vissu at siga, at vanlig fólk eru rættuliga líkaglað um, hvussu lutfallið er millum tað, tey gjalda í kommunuskatti og landsskatti ella øvuðgt. Tað sum telur er samlaða skatta- rokningini, sigur Poul Michelsen, løgtingsmaður**

Fyrispurningurin hjá Jørgen Niclasen til Bárð Nielsen er tó viðkomandi. Tað at skattauppgerðin vísir, hvussu nógv verður goldið í landsskatti, og hvussu nógv í kommunuskatti er í fínasta lagi.

Men fyrispurningurin hevði eitt týðuligt yvirorðnað sikti – nevnliga at gera eina roynd at lovprísa landsins fíggjar- og skattapolitik upp á bekostning av teimum føroysku kommununum.

Landið hevði lækkað skattin, meðan kommunurnar hækkaðu skattin í fleng!!

Fólkaflokkurin stendur í front, tá tað snýr seg um at leggja uppgávur út til kommununar. Fólkaflokkurin vil skapa álit millum løgting og kommunur í hesi sera týdningarmiklu gongd – í teirri sannføring, at tá kommunurnar yvirtaka málsøkir, sum natúrliga hoyra nærsamfelagnum, verður tænastan munandi betri. Hetta hava vit longu fingið prógv fyri.

Tí er tað sera óheppi, at fólkaflokksmenn - umvegis fyrispurningin – renna saman við javnaðarmonnum í eini misálitisherferð á ætlanina um at leggja uppgávur út til kommununar at røkja. Hetta gagnar ikki okkum, men er »søti« musikkurin í oyrunum á javnarpolitikkarum, sum goyma sterkar kreftir ímóti kommunalari menning – og hetta hoyrdu vit av tingsins røðarapalli henda dagin.

Ætlanin við at flyta uppgávunar út til kommununar eru m. a. at fáa virksemi spreitt kring landið, fáa tættari samband við borgaran og geva kommununum nýtt og fjølbroytari innihald og ikki minnst at flyta landsins peningarensl frá landskassanum til kommunukassarnar.

Men bæði Óli Breckmann og Jørgen Niclasen eiga at vita, at kommunurnar í samráðingunum um yvirtøku hava góðtikið, at tær – tá tær yvirtaka málsøkir – bert fáa pening fluttan yvirum svarandi til tað tænastustøðið, landið hevur yvirtøkudagin. Øll menningin og hækkaðan av tænastustøðinum skulu kommunurnar bera einsamallar.

Eg eri sannførdur um, at nýggja uppgávubýtið millum land og kommunu, er eitt vinnaraprojekt fyri allar partar – fyri land, kommunu og ikki minst fyri borgaran. Tí haldi eg, at fyrispurningurin um broytingar í skattauppgerðini – sæð í mun til hvussu orðaskiftið fall út – á ongan hátt gagnaði politikki Fólkafloksins í hesum máli.

Tað er ongin botnur í påstandinum um, at kommunur og kommunupolitikkarar ikki eru minst líka dugnaligir og ábyrgdarfullir at umsita skattin hjá hvørjum einstakum borgara, og tingmenn eru tað!

Hesa somu fatanina hava fólk flest.

---

# Kommunala sjálvræðið



LISBETH L. PETERSEN
Løgtingslimur

**– Av og á hava umboð fyri politisku flokkarnar á løgtingi nortið við kommunala sjálvræðið í sínum umrøðum, og tá kann talan hava verið um mál av ymiskum slag, í hesum tíðum oftast mál, har fíggingin verður býtt millum land og kommunur, skrivar Lisbeth L. Petersen, løgtingslimur**

Tá so er, sær tann sum fylgir við skjótt eina linju føra aftur til politiskt endamál av onkrum slag. Við hvørt er tað ein partapolitisk hugsjón, ið livast skal upp til, og tað er ein erlig sak; við hvørt er tað lokalur áhugi, og eru grundgevingarnar góðar, er heldur onki at havast at í slíkum føri, men onkuntíð hómar tú nakað annað aftanfyri, sum eg ikki meti eigur at krógvast burtur.

Sum fyrrverandi kommunalpolitikari havi eg eins og onnur eitt vakið eyga, tá tað snýr seg um at leggja mál frá landi til kommunur.

**Tað ber til at flyta**

Eg gangi fult inn fyri, at tað skal vera møguligt at flyta mál yvir til kommunurnar, tá semja kann gerast um tað. Hetta tænir í næstan øllum førum borgarunum best. Í alt ov langa tíð høvdu vit eina óhóskandi kommunulóg, ið var ein stór forðing fyri kommunalari menning, tí við umleið 50 kommunum, har hin størsta hevði millum triðing og helvtina av samlaðu íbúgvunum í landinum, kundi umstøður og arbeiðsháttur ikki samanberast. Sjálvandi vóru møguleikarnir at umsita mál kommunalt ikki teir somu í eitt nú Tórshavnar kommunu sum t.d. í Saksunar kommunu, fyri bert at nevna eitt dømi.

Tá tú nú fært ánilsi um, at endamálið hjá summum landspolitikarum í dag fyrst og fremst er at fáa landsins fíggjarlóg at síggja ”betri” út, og argumentið er skattalætti, ið skal kunna prógvast, so fara ávaringarlampurnar at blunka!

Hatta er ikki nóg gott !

**Orsøkirnar ?**

Nógvar orsøkir eru til at lata kommunurnar umsita almennar tænastur, tá tær hava orku til tess. Landið eigur at seta rammur við krøvum, ið skulu uppfyllast, so støðið verður lagt, og kunnu kommunurnar uppfylla krøvini, eiga tær at sleppa at umsita økið, tí ein kommuna kennir oftast betri umstøðurnar og tørvin hjá sínum borgarum. Sjálvandi skal fíggjarliga ábyrgdin eisini fylgja við.

Hetta skal gerast í samráð millum land og kommunu frammanundan.

Tað er ikki kommunalt sjálvræði, um landið blandar seg uppí, og ”dikterar” tað fíggjarliga. Er semja millum kommunu og land at flyta mál yvir saman við tí fígging, ið økið kostar, so er tað upp til kommununa sjálva, um hon útbyggir tilboðini til sínar borgarar. Skal landið eisini gera av, hvussu nógvan pening kommunan kann brúka, og tá sjálvandi krevja inn til sama endamál, so er tað ikki kommunalt sjálvræði!!

Landið eigur at seta eitt minstamark av almennum tænastum til borgaran, og landið eigur eisini at hava eitt ávíst eftirlit við, at kommunalur skattur veruliga verður brúktur til tað, hann er ætlaður, men landið skal ikki steðga eini kommunu at leggja sítt egna støði, sum kommunan metir er hitt rætta, sjálvt um landspolitikarar í einum samgonguskjali hava lagt eitt fíggjarligt støði saman við sínum samgongufeløgunum egna vegna.

Veljarar í eini kommurnu hava samb. lóg valt síni umboð, og eru tey ónøgd, so velja tey onnur umboð.

Sama er galdandi fyri landspolitikarar, tá talt verður upp eftir eitt løgtingsval! Tað eiga landspolitikarar ikki at gloyma, antin teir ella tey so eru løgtings- ella landsstýrislimir.

---

Sjónarmið:

# Ein eliter mentan – fyri tey útvaldu



DAGNY JOENSEN
Rithøvundur

**Spurnartekin kann kanska eisini setast við, hvørt tað er rætt, at eitt so lítið land sum okkara skal –skapa eina skrivandi elitu. So langt eru vit als ikki komin. Vit mugu grulva, áðrenn vit kunnu ganga, sigur Dagny Joensen, rithøvundur, sum ger viðmerkingar til kjakið um Mentanargrunn Landsins**

Tað er áhugavert, at kjakið um møguleikarnar hjá skrivandi fólki er kyknað á føroyska mentanarpallinum. Umstøðurnar at menna og stimbra rithøvundar hevur kanska ongantíð áður verið so fáum til gagns sum nú á døgum, hóast samfelagið annars er komið fyri seg seinastu árini. Tað prógva upplýsingarnir, sum Jústinus Eidesgaard herfyri leitaði fram. Takk til vinmannin fyri tað.

Um tað er stuðulsskipanin og reglurnar í Mentanargrunni Landsins, sum er orsøkin, er torført at meta um. Givið er tað, at menniskjansliga samansetingin í nevndini er ein orsøk, al tann tíð at tað eru tey, sum gera av, hvat vit føroyingar skulu meta sum góð ella vánalig avvrik hjá skrivandi fólki.

Tó skal havast í huga, at tað er politiska skipanin, sum hevur ábyrgdina av, hvussu høgt hon prioriterar bókmentirnar, og hvønn leiklut tær hava fyri eitt framkomið samfelag.

Tað var tann tíðin í sjeytiárunum, tá tað var sum at spæla við eld at dytta sær til at nýta skriftmálið. Tað sokallaða fróðskaparføroyska málið var í stoypiskeiðini, og Gud náði tann, sum av óvart ella av misgávum setti eitt komma skeivt ella brúkti skeiva orðing.

Tað førdi við sær, at fólk nærum ikki tordu at festa orð á blað. Tað miseydnaðist og er kanska ein orsøk til, at skriftmálið er fátækrari í dag, enn tað annars hevði verið.

Hetta eyðkenni tykist nú at vinna frama aftur, tá hugsað verður um skrivandi elituna. Bert tey útvaldu fáa stuðul og hervið møguleikan. Tað er eisini ein forðan fyri nýskapan og margfalni í bókmentum okkara og minnir um orðingina ”vágafúsan kapital” innan vinnulívið, sum var so nógv frammi í kreppuárunum.

Tað er júst eksperimentið, sum kann føra til okkurt nýskapandi, sum kann geva afturljóð á mentanarpallinum. Tað áttu vit sum fólk at verið so mikið at okkum komin, at vit høvdu dirvi og mót at viðganga.

Um føroyska samfelagið er so fátækt, at tað ikki hevur ráð at stuðla sínum rithøvundum í hesum føri, hendir júst tað, sum vit ikki vilja viðganga – nevniliga, at alt stendur í stað, og at fólk ikki hava hug ella orku at lesa tað, sum verður givið út. Tað forðar fyri framburði.

Eg veit ikki, um rithøvundar eru so nógv øðrvísi enn onnur fólk, men bert tað at sápla alt niður, sum onnur gera, fyri síðani at reypa sær av at verða størsta skald seinastu 40 árini, tykist at vera nóg mikið til at fáa arbeiðsfrið í áravís.

At ein rithøvundur skal fáa 800,000 krónur í stuðli yvir fimm ára tíðarskeið, er fyri onnur, sum einki fáa – óhoyrt, og skapar gróðrarbotn fyri undirlutakenslum og ábreiðslum, sum ikki áttu at vunnið frama innan bókmentir okkara.

Tað verður so ongantíð til nýbrot innan føroyska mentan.

Líta vit frameftir, og sama stuðulsskipan verður galdandi, kunnu vit kanska meta um framtíðar útlitini fyri bókmentum okkara soleiðis: Útreiðslurnar fyri nýskapan á bókmentaøkinum fara at kosta eins nógv og eitt hampuligt skip.

Tá er greitt, at vit skulu bíða í nógv ár eftir at føroyski bókmentaheimurin verður ríkaður og kemur á nøkurlunda hædd við tað, sum onnur lond bjóða sínum lesararum.

Spurnartekin kann kanska eisini setast við, hvørt tað er rætt, at eitt so lítið land sum okkara skal skapa eina skrivandi elitu. So langt eru vit als ikki komin. Vit mugu grulva, áðrenn vit kunnu ganga. Vit kunnu ikki dúva upp á teir góðu, gomlu rithøvundarnar og skaldini, sum løgdu lunnar undir føroysku bókmentirnar.

Ivaleyst hava vit eisini brúk fyri at menna og stimbra so nógvar ungar og gávuríkar rithøvundar, sum til ber, sum við sínum avrikum við tíðini kunnu prógva, at teir hoyra til teir bestu her á landi.